KÍ-VB 4-1 (2-0):

# KÍ sigraði á mótleysum vágbingum



*Vágbingar tóktust heldur máttleysir við skerda liðinum, og formáddu sær ongan tíð at gerast ein verulig hóttan móti KÍ*

**Klaksvíkingar kundu vunnið við nógvum fleiri málum ímóti einum VB-liði, sum tóktist mest sum ein skuggi av einum føroyameistara**

1. DEILD
*Jákup Mørk*

KÍ hevði nógvar kjansir at gera mál, tá VB var á vitjan í Klaksvík leygardagin. Vágbingar vóru tamir, og hóast teir brendu tveir góðar kjansir, so var tað heimaliðið, sum var ruddiliga við yvirlutan alla tíðina.

KÍ legði seg fram um 2-0 í fyrra hálvleiki, og teir skoraðu tvey mál afturat í seinna hálvleiki, hóast møguleikarnir vóru til mangt slíkt. VB kom afturíaftur, tá støðan var 3-0 til KÍ, men teir kláraðu ongantíð at hótta heimaliðið, sum hevði betri álopsspæl enn nakran dyst í ár.

Tað hevði helst eisini týdning fyri gongdina í dystinum, at Jacobsen-tvíburðarnir í VB-verjuni ikki vóru við hendan dystin. VB-miðverjan kláraði ongantíð at fáa bilbukt við Kurt Mørkøre og Alexander Djordjovic, sum vóru væl upplagdir. Alexander skapti nógv, og Kurt hevði møguleikar at gera fleiri mál, men hann var óheppin í fleiri støðum.

## Broytingar hjá KÍ

Bæði liðini byrjaðu dystin varisliga, og fyrsta hálva tíman vóru tað fáir málmøguleikar. KÍ fekk ein kjans tíðliga í dystinum, og hann avgreiddi Alexander Djordjevic í VB-málið. Alexander slapp leysur inn í brotsteigin, og so var hann tryggur, tá hann avsluttaði.

Seinna hálva av fyrra hálvleiki var meira undirhaldandi enn tann fyrra. KÍ kom til onkrar kjansir afturat, og málið til 2-0 var frágera gott. Uppspælið byrjaði væl, og frammi ímóti brotsteiginum spældu Tomislav Sivic og Kurt Mørkøre bandaspæl. Endin var, at Sivic prikaði Kurt leysan, og so sparkaði KÍ-framherjin bóltin í málið úti við stólpan.

Í fyrra hálvleiki hevði KÍ-verjan, har Jan Andreasen aftur var sweepari, fult tamarhald á støðuni, og tað var ikki fyrr enn í seinna hálvleiki, at VB-álopsmenninir bitu eitt sindur frá sær.

Niclas Niclasen og Símun Joensen vóru báðir farnir av landinum, og tí spældi Harley Bertholdsen vinstri vongverji, meðan Atli Danielsen var fluttur á høgra vongverja. Hetta riggaði væl, og Harley kom ofta til baklinjuna. Hann kundi tó havt betri eydnu við innleggunum, sum kiksaðu eitt sindur á tí tunga vøllinum.

## Brendi størsta kjansin

Málið til 3-0 var eisini gott, og hesaferð kom Harley bæði til baklinjuna og legði ein góðan bólt innfyri. Tomislav Sivic hevði frammanundan bjóða einum passivum Marek Vierzbicki av, og tá Harley yvirlappaði, slepti Sivic bóltin til vongverjan. Flata innleggið endaði í einum trunka av spælarunum, og har hevði verjumaðurin, Ove Nysted, longstu tánna og prikaði bóltin í málið.

Tað var eftir hetta málið, at VB kom meira við í dystin, og teir spældu seg til onkrar kjansir ímóti KÍ-verjuni, sum í løtum var óskipað. Robert Cieslewicz hevði størsta møguleikan í dystinum, eftir at Popzcynski var farin ígjøgnum í høgru og avsluttaði á stólpan. Robert fylgdi upp, men úr fimm metrum kláraði hann at senda bóltin á tvørstongina á tóma málinum.

Løtu seinni var Robert spældur leysur í vinstru, og ta ferðina avsluttaði hann trygt inn við nærmara stólpa. So var støðan 3-1, men tað lá ongantíð í luftini, at VB skuldi taka KÍ aftur.

## Punktum

Í hinum endanum av vøllinum hevði KÍ fleiri møguleikar at gera mál, men tað eydnast bara eina ferð afturat í dystinum, hóast møguleikar vóru til eini trý ella fýra mál afturat. Tað var Fríðin Ziskason, sum breyt ígjøgnum VB-verjuna eftir ein tvørbólt frá Sivic. Hann snýtti ein VB-verjumann, og so legði hann bóltin nøkunlunda miðskeiðis í málið, tá Bjarni Johansen var á veg niður.

Hetta var næsta málið hjá Fríðin í tveimum dystum, og hann tykist verða í góðum formi á miðvøllinum, har hann og Jan Joensen hava týdningarmiklar uppgávur.

Tórður Holm manglaði á miðvøllinum hjá VB, og tað sást best, tá hann kom inn í seinna hálvleiki. Jón Pauli Olsen fór á vinstra vongverja at spæla, eftir at Gisli Sveinbjørnsson var tikin út, og tá gleið spælið á miðvøllinum betur. Tórður var við í nógvum, og eina løtu fluttu VB-arnir bóltin nógv betri, enn teir høvdu gjørt meginpartin av dystinum.

Men hetta var ikki nóg mikið til at venda dystinum, og KÍ fekk ein kærkomnan og tryggan sigur til høldar ímóti føroyameistarunum, sum hesaferð vóru skuggi av tí, teir vóru í fjør.

**Dysturin í tølum:**
KÍ-VB 4-1 (2-0)
1-0: Alexander Djordjevic
2-0: Kurt Mørkøre
3-0: Ove Nysted
3-1: Robert Cieslewicz
4-1: Fríðin Ziskason
Dómari: Oddmar Andreasen (HB)

**KÍ:** Meinhardt Joensen - Ove Nysted, Jan Andreasen, Andras Jacobsen - Atli Danielsen, Jan Joensen, Tomislav Sivic, Fríðin Ziskason, Harley Bertholdsen - Kurt Mørkøre, Alexander Djordjevic
**VB:** Bjarni Johansen - Palli Augustinussen, Predrag Zickovic, Michael í Lágabø, Marner Richard, Gisli Sveinbjørnsson - Marek Vierzbicki, Jón Pauli Olsen, Krzystof Popczynksi - Robert Cieslewicz, Birgir Jørgensen


Búgvið í Caravan

Hugnið tykkum í Skotlandi



**Atlantic Airways Caravan í Nairn.**
Vit hava tveir eksklusivar "Caravans", sum vit hava serútgjørt til føroyingar. Teir standa á vakra Nairn økinum sum liggur út til strondina.
Nossligu og væl útgjørdu vognarnir eru heilar 42 fermetrar og hava umframt allan vanligan útbúnað, alskyns hentleikar so sum: sjónvarp, video, stereoanlegg, mikroovn, føroyskar leikur, -bøkur og -videobond. Knýtt at økinum er spæliplass, svimjihylur (innandura), hitarúm, solarium, minigolf o.a.

**Nairn:**
Nairn Lochloy er vakurt umráði framvið Moray-fjørðin. Tað tekur 20 minuttir til Inverness og 1 tíma við toki til Aberdeen. Tað tekur 10 minuttir til gongu til miðbýin í Nairn.

**Dømi:**
Um 2 vaksin og 2 børn undir 12 ár ferðast saman.

Við í prísinum er flogferð og gisting í Caravan.
Galdandi frá 3. sept. - 28. okt.

7.492,-*

**Prísir fyri hvønn um:**
6 ferðast saman: 2.083,-*
8 ferðast saman: 1.976,-*

*) Ferðaavgjald sum í løtuni er kr. 474,- fyri vaksin og kr. 354,- fyri børn kemur afturat prísinum.

Vit hava tveir "Caravans", ein til 6 og ein til 8 persónar.

MB-Tours M3
Tel: 32 21 21 - Fax 32 21 22

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 40 - Fax 34 10 01
www.atlantic.fo




B68-NSÍ: 2-1 (1-1):

# B68 støðast betri

**Tríggjar deyðbóltsstøður skuldu til fyri at avgera lokaluppgerðina, tá B68 og NSÍ hittust á Svangaskarði leygardagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Grannauppgerð var á Toftum leygardagin, og sum vera man, var hetta ein dystur, sum tey bæði fyrstudeildarliðini á Skálafjørðinum løgdu stóra orku í at vinna. Spenningurin undan dystinum gjørdist heldur ikki minni av, at liðini bæði hava verið við í bólkinum, sum seinastu umførini hava verið partur av bronsustríðnum.

## Brotsspørk

Umstøðurnar at spæla vóru einki serliga á Svangaskarði leygardagin. Eins og í restini av landinum var fitt av vindi, og hetta gjørdi tað sera torført at fáa nakað samanhangandi spæl í hjá liðunum báðum.

Tað var NSÍ, sum hevði vindin undan í fyrra hálvleiki, men kortini vóru tað toftamennnir, sum løgdu nógv betri fyri. Ímóti vindinum runnu bóltarnir ikki undan álopsmonnunum, og longu eftir fýra minuttum hevði Súni Fríði fingið sokið gott tamarhald á einum bólti, at Kári Hansen sá seg noyddan at taka beinini undan honum.

Hetta hendi inni í brotsteiginum, og eftirfylgjandi brotssparkið sendi Súni Fríði sjálvur trygt í netið.

B68 helt á fram við málsókna spælinum, og bert fimm minuttir eftir leiðslumálið, átti hetta aftur at givið úrslit. Súni Fríði slapp leysur av NSÍ verjuni, sum mátti vera burturstadda Djóna N. Joensen fyriuttan, og tá hann skuldi runda Jens Martin Knudsen, sá landsliðsmálverjin sær ongan annan útveg enn at taka beinini undan honum.

Súni Fríði skeyt aftur, men hesa ferð hevði Jens Martin lúrt hann av, soleiðis at runavíkingar kundu draga andan eitt sindur lættari aftur.

Runavíkingar fingu nú spakuliga tamarhald á spælinum, men í uppbygginini av álopunum framdu teir ta deyðssynd, at teir at kalla bert royndu seg við høgum bóltum innn í brotsteigin. Her var Hans Fróði Hansen at kalla einaráðandi í luftrúminum, og sæð burtur frá fleiri hornaspørkum, var ógvuliga smátt við møguleikum hjá NSÍ.

Ein opnan møguleika fingu teir tó, tá linjuverjin vísti dómaranum á, at Messias hevði framt eina misgerð í brotsteiginum. Sjúrður Jacobsen er vanliga tryggur úr 11 metrum, og tað var hann eisini hesa ferð.

## Vandamikil hornaspørk

Í seinna hálvleiki vóru tað toftamenn, sum høvdu vindin undan, og hetta gjørdi eisini, at spælið í stóran mun varð trýst oman á NSÍ hálvuna.

Eins og hjá NSÍ í fyrra hálvleiki, so spurdust eisini fleiri hornaspørk burturúr, og serliga vóru tað tey úr vinstru síðu, sum Arnold Joensen tók sær av, sum skaptu vandastøður í NSÍ-brotsteiginum. Avgerðin fall eisini eftir eitt av hesum hornaspørkum. Hornasparkið varð skotið tætt inn undir málið, og var Dánial Hansen somikið óheppin, at hann beindi bóltin í egið mál.

Eftir hetta fullu toftamenn nakað aftur á vøllin, men hóast hetta, so megnaði NSÍ ikki veruliga at hótta heimaliðið. Heldur var tað nærri við, at heimaliði økti um leiðsluna, men nærri enn einum stórum avbrennara hjá Marcello komu toftamenn ikki, so máltalvan stóð óbroytt alla dystin á tamb.

## Aftur eitt vónbrot

Við sigrinum halda toftamenn fast um hugaligu gongdina, sum hevur staðið við seinastu vikurnar. Eftir eina katastrofala byrjan var annars líkt til, at liðið var fullkomuliga avskrivað í kappingini um heiðursmerki, men seinastu vikurnar hava tó prógvað, at enn eru knotur í teimum reyðu og hvítu.

Runavíkingar fingu hinvegin enn eina ferð staðfest, at tað heldur ikki verður í ár, at teir fara at gera seg galdandi í heiðursmerkjarøðini. Vónirnar til liðið vóru annars stórar í ár, men sum støðan er nú, so verður fjórða plássið framhaldandi besta úrslitið, sum liðið hevur vunnið sær í bestu deildini. Skal hetta broytast, er alneyðugt at liðið komandi ár

**Dysturin í tølum:**
*B68-NSÍ 2-1 (1-1)*
1-0: Súni Fríði Johannesen (br.) 4
1-1: Sjúrður Jacobsen (br.) 22
2-1: sjálvmál (Dánial Hansen) 67

**Dómari:** Páll Augustinussen (VB)

**B68:** Kjartan Nesá - Hans Fróði Hansen, Oleif Joensen, Messias Parreira – Marlon Jorge, Jann Ingi Petersen, Jan Petersen, John Heri Dam, Jákup Eli Olsen - Súni Fríði Johannesen, Arnold Joensen
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Ken Nónklett, Kári Hansen, Arnfinn Langgaard – Brynjolvur Nielsen, Ian Højgaard, Sjúrður Jacobsen, Eddie Mikkelsen, Jónstein Petersen – Dánial Hansen, Sonni L. Petersen



*Súni Fríði Johannesen og liðfelagarnir kunnu nú aftur smílast. B68 tykist hava bitið seg fast á bronsuplássinum, sum teir mest sum høvdu avskrivað fyrr í ár*


Marknaðarfólk

Søkt verður eftir starvsfólki til marknaðardeild okkara

Talan er um eitt spennandi og sjálvstøðugt starv við góðum møguleikum fyri persónligari menning.

**Uppgávurnar umfata at:**
- gera marknaðarkanningar
- tilrættisleggja og samskipa marknaðarátøk
- røkja dagliga samstarvið við deildir okkara kring landið
- gera upplegg til lýsingarstovur
- røkja dagliga samstarvið við lýsingarstovur og miðlar
- luttaka í arbeiðnum við heimasíðu okkara og øðrum marknaðaruppgávum

**Viðkomandi, ið sett/ur verður, skal:**
- hava hóskandi útbúgving innan marknaðarføring ella aðra viðkomandi útbúgving
- hava hollan teldukunnleika
- duga at skriva lýsingartekstir á føroyskum og enskum
- skyn fyri uppseting, skapi og prenti
- starvsroyndir í peningastovni ella innan marknaðarføring

**Persónligir eginleikar:**
- hevur hugflog, áræði og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- er fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni

Starvsstaðið er í Tórshavn. Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Ólav Jensen, marknaðarleiðara á tlf. 348 540.

Løn sambært avtalu.

Umsóknir skulu verða Føroya Sparikassa í hendi í seinasta lagi 23. august 2001, og skulu sendast til:

Føroya Sparikassi
att.: Starvsfólkaleiðarin
Postsmoga 34
110 Tórshavn

FØROYA SPARIKASSI
Marknaðardeildin, Yviri við Strond 2, FO-100 Tórshavn
Tel 348 000 Fax 348 454 E-postur: Marknaðardeildin@sparikassin.fo www.sparikassin.fo

*Arbeiðsøki hjá marknaðardeildini fevnir m.a. um marknaðarføring, tænastumenning, samskipan av økismarknaðarføring, rokt og menning av heimasíðuni og innkeyp/goymslu. Í løtuni arbeiða 3 fólk á marknaðardeildini.*